Sosialurin
# VARPIÐ
FRÍGGJADAGUR 24. feruar 2006

## 80 ÁRA DANSUR

Rimmar 80 ára dansur við Hjarnum, Black Birds og Sámal & Ronnie verður í Ítróttarhøllini á Hálsi leygarkvøldið 4. mars.

Frásøgumaður verður Jákup Magnussen.

STUÐLAFELAGIÐ HJÁ ARGJA BÓLTFELAG





**DR1 Dokumentar - Palme-morðið**

Tað eru 20 ár síðan Palme varð skotin á almennari gøtu í Stockholm. Í hesi sendingini sigur ein fyrrverandi gangstari frá, og morðið fær ein heilt øðrvísi lýsing, enn áður. Svenski dokumentaristurin Mikael Hylin hevur ígjøgnum fýra ár gjørt samtalur við brotsmenn úr narkoumhvørvinum. Sjálvt lygnir kunnu leiða ein nærri at sannleikanum.

**Mánadag 27. kl. 19.00**

**Hirohito keisari**

Hirohito keisari sat við valdið í Japan frá 1926-89. Øll hesi árini gekk hann á odda fyri Herinum og politiska og andaliga lívinum í Japan. Eisini í nærum 15 ára langa krígnum frá 1931 til 1945, ið kostaði meira enn tjúgu milliónum menniskjum lívið. Eftir Seinna Heimsbardaga vardi Hirohito keisari seg við, at hann var ein máttleysur fangi í einum avmarkaðum ríki. Dokumentar frá BBC. Hesa vikuna eru fleiri forvitnisligar dokumentarsendingar á skránni. Fleiri og ymisk eru evnini, tað snýr seg um Titanic, Eric Clapton, ferðslupolitikk í Norra, Palme-morðið, mótmælismentan og umhvørvisdálking í Arktis.

**Týsdag 28. kl. 23.05**

**Slóðarar 3:3 - Jákup í Lopra**

Triðja og fyribils seinasta sendingin í røðini um slóðarar er um Jákup Joensen. Sumbingin, ið gjørdist lopransmaður, reiðari, flakavirkis- og hoteleigari og politikari. Og sum brádliga stóð á berum, eftir at hava mist alt. Sjálvur heldur hann, at hann hevði betri evni sum vinnulívsmaður enn politikari. Tey fýra árini á tingi vóru tó við til at reisa hann aftur á føtur fíggjarliga, so hann kundi byrja av nýggjum. Og nú - sum 76 ára gamal - hevur hann júst latið upp flakavirkið Kirvi í Lopra. Vit møta einum sera opinskáraðum Jákupi í sendingini. Til dømis dylir hann ikki fyri, at Suðuroyggin - ikki minst sunnara helvt - hevur brúk fyri fleiri persónum av hansara slag, skal hesum partinum av landinum verða lív lagað. Leivur Hansen hevur gjørt sendingina um Jákup í Lopra

**Sunnudag 26. kl. 20.00**

Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**